

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 07 - 2012

# Føroyar skulu gerast miðdepil fyri frálandavinnu

Kaj Leo Johannessen, løgmaður nam eisini við olju- og frálandavinnuna í røðu síni á ólavsøku. Hann segði m.a. - Í hesum døgum verður áttandi brunnurin eftir olju boraður við Føroyar. Ætlanin er at bora gjøgnum basaltfláirnar. Hetta er dýrasta verkætlan í Føroya søgu. Hóast olja og gass ikki eru funnin í rakstrarverdum nøgdum, hevur virksemið higartil ment og varpað ljós á møguleikar hjá føroyskari vinnu og arbeiðsmegi. Í dag arbeiða nógvar fyritøkur og einstaklingar íoljuvinnu uttanlands. Hetta gevur inntøkur, og vit gerast betur før fyri at taka ímóti avbjóðingunum, tá kolvetni verður útvunnið á okkara øki. Føroyska Altjóða Skipaskrásetingin er komin á hvíta lista hjá Paris MOU. Miðvísa arbeiðið at marknaðarføra skipanina sum eitt hágóðsku flagg hevur eydnast. Skipanin kastar inntøkur av sær, og so hvørt sum talið á skipum veksur, víðkast møguleikarnir fyri avleiddum virksemi. Vit hava nú eina kappingarføra skipan, har 79 skip eru skrásett. Málið er at røkka 100 skipum í ár. Her kann staðfestast, at tað grør um gangandi fót. Løgmaður nam eisini við spurningin um at fáa orku burtur úr varandi orkukeldum og segði, at landsstýrið hevur sett sær fyri, at í 2020 skulu millum 80 og 90 prosent av orkunýtsluni á landi stava frá varandi orkukeldum. Til hetta krevjast stórar íløgur. Landsstýrið er saman við SEV og kommunufeløgunum farið undir eina umfatandi greining av øllum elorkukervinum og útbyggingarmøguleikunum. Kanningin verður liðug um ársskiftið.